gult cyan magenta svart



# Miðbýurin ynskir øllum viðskiftafólki sínum einar gleðiligar páskir



gult cyan magenta svart




Vilja tygum við Í Býin
- hvønn hósdag




## Tvingsilssøla

Hósdagin 19. apríl 2001, kl. 9.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 89 c, Sumba (AS nr. 3/2001).

Sambært tingbókini er økið á mtr. nr. 89 c, Sumba til støddar 1676 $m^2$. Húsini eru í 3 hæddum, klædd við timbri og takið er úr almuminium. Grundin er lagað upp av gróti, og sambært eigaranum er grundin umleið 100 ára gomul. Húsini vórðu rivin niður og bygd upp aftur av nýggjum í 1992. Í havanum er ein hjallur.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:
Kjallari: Í kjallaranum er oljufýr og oljutangi.
Miðhædd: Gongd við trappu upp á loftið, 1 wc/bað, køkur v/ altan og stova.
Loftshædd: Gongd og 4 kømur.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4381601), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*ann*


*Allar støddir*

*Vit hvessa eisini*



**Tórshavnar Maskinhandil**
**v/Tummas Andreasen**
ar agøta 9 30
100 Tórshavn • Tel. 313



**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*


# Listastevna Føroya

## Stuttsøgukapping

**Innbjóðing**
Listastevna Føroya lýsir við hesum til kapping at skriva nýggja, føroyska stuttsøgu.

**Endamál**
Føroyar eru í eini broytingartíð, samfelagsliga og mentanarliga.
Kappingin ætlar at fáa til vega tekstir, sum geva listarligar myndir av umstøðum og kenslum í okkara fjølbroyttu samtíð, ella sum viðgera evni, ið hava týdning fyri okkum í dag.

**Treytir**
Dentur verður lagdur á, at stuttsøgan endurspeglar nútíðarsamfelagið.
Longdin á stuttsøguni eigur at vera í mesta lagi 20 A4 síður. Á hvørjari síðu: 2000 eindir.
Stuttsøgan skal vera skrivað á føroyskum máli.
Dómsnevndin hevur rætt til ikki at lata virðisløn, heldur hon tær innkomnu stuttsøgurnar ikki vera virðislønarverdar.

**Virðislønir**
3 virðislønir verða latnar:
1. virðisløn: 20.000,- kr.
2. virðisløn: 15.000,- kr.
3. virðisløn: 10.000,- kr.

**Dómsnevnd**
Til at viðgera tær innsendur stuttsøgurnar er ein dómsnevnd sett. Í nevndini eru: Lydia Didriksen, Niels Jacob Thomsen, Turið Sigurðardóttir og Guðrun Gaard.

**Innlating**
**Stuttsøgan skal latast inn dulnevnd við frámerki. Saman við stuttsøguni skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan og við navnaseðli í, sum sigur, hvør ið hevur skrivað. Stuttsøgan skal vera latin inn í seinasta lagi 20. apríl 2001 og sendast Listastevnu Føroya.**

**Listastevna Føroya**
Norðurlandahúsið
Norðari Ringvegur
Postsmoga 1260
110 Tórshavn

# Ferðavinnan í Eysturoynni

hevur aðalfund á Studentaskúlanum í Kambsdali í kvøld kl. 19.30.

Skrá sambært viðtøkum.

Allir limir og kommunur í Eysturoynni eru vælkomin.

**Ferðavinnan í Eysturoynni**

# Pedagogur

## til frítíðaransingina í Runavíkar Kommunu

Søkt verður eftir pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í frítíðaransingini í Runavíkar Kommunu.
Frítíðaransingin, sum er skipað undir Kommunalu Barnaansingini, er normerað til 30 børn.

Vit ynskja at tú ert kreativ/ur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum.

Starvið verður at seta skjótast tilber, ella eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá leiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunalu Barnaansingi í hendi í seinasta lagi 20/04-2001.

**Kommunala Barnaansingin**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy

og

# Klaksvíkar HF-skeið

Frá 1. august 2001 er starv leyst at søkja í hesum lærugreinum:

**alis-/evnafrøði, enskum og teldufrøði**

Umsøkjarar við eini av omanfyri nevndu lærugreinum saman við **aðrari lærugrein** kunnu eisini søkja. Tímar eru leysir í **latíni, leiklist, lívfrøði, støddfrøði, tónleiki og týskum**.
Harumframt er frá 1. august 2001 leyst at søkja:

**eitt ársvikariat í enskum**

Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF). YF-umsóknarbløð fáast frá skúlanum (tlf.: 444024, faks: 444797) ella frá Yrkisfelagnum.

Umsóknin skal **stílast til Føroya Landsstýri, Mentamálastýrið,** og vera rektaranum í hendi **í seinasta lagi 23. apríl 2001.**

Adr.: Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy
att.: Sámal í Skorini, rektari
Kambsdalur
530 Fuglafjørður




**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**